## Undri vann sín fyrsta steypadyst

Fyrsta umfarið í kappingini um Løgmanssteypið varð spælt um vikuskiftið. Mest søguliga úrslitið var helst, at Undri vann sín dyst á MB, tí hetta var fyrstu ferð yvir høvur, at Undri hevur spælt seg víðari í steypakappingini. Úrslitið av dystinum varð 3-2 til Undrið.
Aðra staðni vann FS Vágar 2004 tryggan 8-1 sigur á NÍF, og eisini vann LÍF hampuliga trygt á Fram. Úrslitið varð 3-0, men tað stóð tó á jøvnum, til bara fáir minuttir vóru eftir at spæla.
Og á Sevmýri mátti B68 lúta fyri TB, sum við 2-0 sigri spældi seg víðari til næsta umfarið í kappingini.

## Spæla á Wembley í mars

Byggingin hevur verið nógv seinkað, men tann 24. mars kann nýggja Wembley stadion í London loksins takast í nýtslu. Hóast almennu boðini ikki eru givin enn, so skal vøllurin ætlandi takast í nýtslu, tá enska U21-landsliðið skal spæla móti Italia. Seinni í ár skal vøllurin millum annað nýtast til FA-Cup finalu, ið er ein av størstu hendingunum í enskum fótbólti yvirhøvur. Seinnu árini hevur hendan verið spæld á Millenium Stadium í Cardiff, Wales.



# Dómararnir eru burtur í oktobur

**Formaðurin í hondbóltsdómarafelagnum sigur, at nýggja skipanin væl kann skræða teppið undan føroysku hondbóltsfeløgunum**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Við nýggju lóggávuni er vandi fyri, at hondbólturin ongar kvalifiseraðar dómarar hevur til fremstu deildirnar, tá farið verður undir nýtt kappingarár*

- Vit duga bara at síggja, at hetta kann fáa heilt álvarsligar avleiðingar fyri hondbóltin.

Somikið bersøgin er formaðurin í hondbóltsdómarafelagnum, Hartvig Joensen, sum ber ótta fyri, at hondbólturin væl kann standa uttan dómarar, tá farið verður undir næsta kappingarár, um eingin regulering verður gjørd í nýggju lógini.

### Undirskot av døming

Verandi skipan við hondbóltsdómarum er soleiðis, at dømir eitt dómarapar dyst í Atlantic Airways- ella Sunset-kappingini, fáa dómararnir goldið 1.200 kr.. Er talan um dupultan dystardag, har dystir í fremstu kvinnu- og mansdeildini verða dømir, er samsýningin 2.000 fyri dómaraparið.

Tað vil siga, at hvør dómari fær 1.000 kr., og í hesum tali er innrokna ferðakostnaðir v.m., sum dómararnir soleiðis sjálvir mugu avhalda.

Men eftir nýggju lógartekstinum verður so sum so við lønini, sum dómararnir fáa fyri ómakin. Verða verandi takstir nýttir sum grundarlag, kann roknast við, at ein dómari upp á eitt álmanakkaár forvinnur á leið 25.000 kr. brutto. Altso áðrenn ferðaútreiðslur eru goldnar.

Skulu hesar 25.000 kr. gjaldast yvir skattaskipanina, verður hetta í fyrstu atløgu toppskattað, tí roknast kann við, flestu dómararnir undan hesum hava eina vanliga løn. Verður roknað við 55% í marginalskatti, eru tá 11.250 kr. eftir til dómaran, sum av hesum skal gjalda mat, bensin, ferðaseðil ella kanska tunnisgjald av upphæddini. Og tað sigur seg sjálvt, at tá er ikki nógv eftir. Og vil illa til, verður talan um beinleiðis undirskot av dømingini.

### Gevast í oktober

Og tað er júst hendan støðan, sum fær Hartvig Joensen at siga, at vit væl kunnu standa uttan dómarar til komandi kappingarár.

- Við verandi aktiviteti hjá fremstu pørunum, so verður markið nátt í oktober mánaði ella so. Og hava vit undan komandi kappingarári dómarar, sum eru komnir nær teimum 15.000 kr., so er tað púrasta sjálvsagt, at hesir tá steðga við at døma. Verður farið upp um markið, so er tað jú øll upphæddin, sum fellur til skattingar, og tí verður talan um veruligan skattasmekk, um dómarin tá hættar sær út á vøllin.

- Og so stuttligt er tað altso heldur ikki at døma. Eg skal á ongan hátt siga, at fíggjarligi parturin er orsøkin til, at menn tíma at døma. Men tað er undir øllum umstøðum eitt plástur á sárið, um eg so má siga. Tí tað eru jú heilir dagar, sum verða nýttir, so tað er ikki annað enn náttúrligt, at ein samsýning verður latin.

- Alternativt mugu feløgini tvífalda samsýningina, men verður hetta gjørt, so má tað vera galdandi fyri alt árið, og tað hava feløgini neyvan ráð til, sigur Hartvig Joensen, sum eisini fýlist á, at felagið als ikki er hoyrt í málinum.

- Eg veit, at ÍSF er hoyrt, men vit hava so ongan tíð fingið nakað sum helst at vita. Og tað haldi eg vera løgið, tá vit so sanniliga verða raktir av lógarbroytingini, sigur Hartvig Joensen.

## Fingu ikki meira

**Heðin Mortensen ásannar, at hann kundi ynskt sær eitt hægri loft, men hann sigur, at hetta var frægasta loysnin, sum ÍSF fekk**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

ÍSF er einasti parturin innan ítróttin, sum er hoyrdur í nýggja skattamálinum, og hóast Heðin Mortensen, ÍSF-forseti, ikki er heilt nøgdur, so staðfestir hann, at hetta var tað frægasta, sum kundi fáast burturúr.

- Eg veit væl, at hetta gevur trupulleikar hjá dómarunum, sum døma mest. Men hetta er politikkarar, sum vit fáast við, og tá er ikki altíð eins lætt at fáa sín vilja. Trupulleikin er jú eisini, at talan hevur verið um eitt øki, har lógarverkið als ikki var nøktandi, og tí hava vit roynt at fingið skipað viðurskifti á økinum. Tann partin hevur tað so eydnast at fáa upp á pláss, men eg eri púrasta samdur í, at markið fyri samsýningum væl kundi verið hægri, sigur Heðin Mortensen.

## Ein hjálpandi hond

**Bárður Nielsen dugir ikki at síggja, at nýggja lógin setir ítróttin verri fyri**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Eg má fyrihalda meg til faktisku lógarbroytingina, og her er eingin ivi um, at talan er um bata. Gamla lógin gav bara dómarum loyvi at forvinna 2.000 kr. skattafrítt, og tí er talan um munandi bata nú.

Men tað hevur verið øllum greitt, at gamla lógin ikki varð hildin, og at skattavaldið heldur ikki gjørdi nakað við hetta. Er hetta ikki í veruleikanum at seta ítróttin í eina munandi verri støðu?

- Tað haldi eg ikki. Nú hava vit fingið eina lóg, sum regulerar hesi viðurskifti. At eitt mark er sett á kemst av, at vit mugu skyna á, nær talan er um hobby ella um vinnuligt virksemi, sigur Bárður Nielsen.

Samstundis sigur hann, at tá inntøkur lægri enn 15.000 kr. um árið verða roknaðar sum hobby, gevur hetta ikki rætt til at fáa endurgjald fyri eitt nú ferðing og vistarhald.

# FSF hevur kanska loysnina

**Ein lógarbroyting, sum varð framd á aðalfundinum, er kanska lógarholið, sum FSF kann smoyggja seg ígjøgnum í dómaraspurninginum**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Samtykta lógarbroytingin hjá FSF hevur við sær, at tað í framtíðini verður so, at FSF rindar dómarunum fyri dømingina, og at rokningsíðani verður send feløgunum.

Og júst hetta letur upp fyri nøkrum møguleikum at samsýna, sum nýggja grein 29 í skattalógini ikki gevur.

Verða dómararnir beinleiðis løntir av FSF, kunnu hesir nevnliga vera vanligir arbeiðstakarar við teimum rættindum, sum slíkir hava.

Millum annað ber tá til at veita endurgjald fyri ferðing og uppihald. Sambært skattalógini kann endurgjald veitast fyri koyring í egnum bili í ørindum fyri arbeiðsgevaran. Endurgjald fyri beinleiðis útreiðslur (ferðaseðlar, tunnilsgjald v.m.) kann veitast, og eisini kunnu vistarpengar veitast, um arbeiðstakari er úti í ørindum í heilan dag.

Tí er væl hugsandi, at skipanin hjá fótbóltsdómarum í framtíðini verður so, at teir fáa eina beinleiðis samsýning, sum er minni enn higartil, men har hesir so fáa endurgjald eftir hægst loyvdu alemnnu takstum, soleiðis at samlaða samsýningin til dómarin kortini verður á einum støði, ið svarar til tað, sum hesir higartil hava fingið.

Hetta vil tó føra nakrar eykaútreíðslur við sær til feløgini. Tí neyðugt verður helst, at samlaða samsýningin verður nakað hægri, nú partur av henni skal skattast. Men tað tekur í øllum førum broddin av teimum avleiðingum, sum samtykta skattalógin annars vil havt fyri fótbóltin.

Og samstundis loyvir hetta, at teir dómarar, sum feløgini áseta, kunnu virka undir nýggju lóggávuni. Tí tað man vera sjáldan, at samlaða samsýningin hjá hesum fer upp um 15.000 kr. um árið.